# Bíðilistin skal burtur

**- Tørvurin á stovnsplássum skal nøktast og dagrøktin mennast komandi fýra árini, sigur Eyðgunn Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd í Klaksvíkar býráð**



*– Eg skilji væl ynskið hjá foreldrum, ið hava børn í dagrøkt, um at fáa tey á stovn. Men tey koma í fyrsta umfari í aðru røð, sigur Eyðgunn Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

BARNAANSING
*Turið Kjølbro*

Nýggj sosial nevnd er farin til verka í Klaksvíkar býráð og nýggj mál eru sett. Eitt mál, sum var nógv frammi undir valstríðnum, er barnaansingin, og hon fær høga raðfesting í býráðnum, ið júst hevur tikið við.

– Vit hava sett okkum sum mál at nøkta tørvin á stovnsplássum í hesum valskeiðnum, og tað trúgvi eg, at vit fara at klára. Viljin í býráðnum er rættiliga góður at loysa trupulleikan, sigur Eyðgunn Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd.

Bíðilistin til stovnspláss veksur alla tíðina og í løtuni bíða 278 børn eftir barnagarðsplássi. Harav hava 120 børn dagrøktarpláss, men ynskja stovnspláss. Tískil skulu í minsta lagi 160 pláss útvegast og tað metir forkvinnan í sosialu nevnd, at tey fara at klára komandi árini. Ferð er komin á menningina av økinum, síðani kommunan yvirtók barnaansingarøkið seinasta summar. Ein dagstovnur lat upp fyrsta yrkadagin í hesum árinum við plássi til 48 børn.

### Útibarnagarður upplagdur

Á fíggjarlógini fyri í ár er sløk millión krónur sett av til økið, og fyri hesa upphædd kunnu ikki nógv pláss útvegast.

– Pengarnir verða brúktir til akutta tørvin, sum er. Hóast upphæddin ikki er stór, ber væl til at at útvega fleiri pláss, sigur Eyðgunn Samuelsen.

Enn hevur sosiala nevnd ikki gjørt greitt á hvønn hátt tey nógvu plássini skulu útvegast, men ein máti, ið liggur heilt frammalaga og sum góðar royndir eru av, er útibarnagarður.

– Vit hava ein útibarnagarð og hann er ógvuliga væl umtóktur. Tí er upplagt, at vit gera fleiri, sigur Eyðgunn Samuelsen.

Eingin dagstovnur er á tekniborðinum enn, men helst verður farið undir fyrireikingar at byggja ein stovn ella keypa hús til endamálið í hesum árinum. Ætlanin er eisini at útbyggja og menna dagrøktarskipanina. Í løtuni hevur dagrøktin ikki tey bestu kor at arbeiða undir. Eitt nú er eingin spælistova, men arbeitt verður við at útvega eina slíka. Antin í kjallaranum á nýggja dagstovninum Kjalarlon ella onkra aðra staðni.

– Eg skilji væl ynskið hjá foreldrum, ið hava børn í dagrøkt, um at fáa tey á stovn. Men vit fara fyrst at miða eftir at útvega børnum, ið einki tilboð hava, pláss á stovni. Hini koma í aðru røð, sigur Eyðgunn Samuelsen.

# Varðin gjørt kvettið



*P/F Varðin hevur selt partabrøvnini í Føroya FiskaídnaðI, sum eigur meirilutan í Havsbrún, fyri eina trivaliga peningaupphædd*

**P/F Varðin hevur selt síni partabrøv í Føroya Fiskaídnaði fyri trífalt so stóra upphædd, sum tey vórðu keypt fyri í 1998**

PARTABRØV
*Eyðun Klakstein*

Leygardagin seldi P/F Varðin í Gøtu partabrøvini, sum felagið eigur í Føroya Fiskaídnaði til Føroya Sildasølu.

Føroya Fiskaídnaður eigur 75% av partabrøvunum í Havsbrún, meðan eitt danskt felag eigur hini 25%.

Talan er um ein framúr góðan handil hjá P/F Varðanum, sum keypti partabrøvini í Føroya Fiskaídnaði frá Føroya Banka í 1998. Tá var prísurin 27 milliónir krónur.

Stjórin í P/F Varðanum, Jákup Jacobsen, vísir til sakførara sín, sum vit ikki fingu fatur á fyri evstamark, men vælvitandi keldur innan vinnuna siga, at søluprísurin hevur verið um 80 milliónir krónur.

### Sildasølan størsti eigarin

Norska stórfyritøkan Pan Fish hevur ligið fram við eftir partabrøvunum í Havsbrún, men higartil hevur eitt tilboð upp á 100 milliónir til Føroya Fiskaídnað ikki havt nakra sølu við sær.

Hinvegin hevur Føroya Sildasøla, sum átti 27,5% av partabrøvnum í Føroya Fiskavirking nú keypt partabrøvini hjá P/F Varðanum, sum átti helmingin.

Føroya Sildasøla er tí nógv tann størsti partaeigarin í Føroya Fiskaíndaði og eigur nú 77,5%. Restina eigur felagið Føroya Sildaskip.

Framtaksgrunnurin:

# Fyrireikar partabrævasølu

**Fortreytirnar eru nú við at verða til staðar, so Framtaksgrunnurin kann selja síni partabrøv í Føroya Fiskavirking og Føroya Fiskasølu**

PARTABRØV
*Eyðun Klakstein*

Tvey av stóru feløgunum í føroyskari fiskvinnuni fáa helst nýggjar eigarar um ikki so langa tíð.

Framtaksgrunnurin, sum eigur øll partabrøvini í bæði Føroya Fiskavirking og Føroya Fiskasølu, fyrireikar nú sølu av hesum partabrøvum.

– Fortreytirnar fyri eini privatisering av Fiskavirking og Fiskasøluni eru um at verða til staðar, sigur Vilhelm Petersen, sum er nevndarformaður í Framtaksgrunninum.

Hann kann ikki greiða nærri frá ætlaninum hjá Framtaksgrunninum, men helst verður meira at frætta seinni í vikuni skilst.

### Nýggj íløgu

Endamálið hjá Framtaksgrunninum er at gera íløgur í feløg, sum hava brúk fyri pengum. Samstundis er endamálið, at Framtaksgrunnurin skal selja síni partabrøv, tá feløgini bera seg.

Bæði Føroya Fiskavirking og Fiskasølan hava staðið seg væl seinastu tvey-trý árini, og tí verða feløgini helst privatiserað í nærmastu framtíð. Komandi føroyski partabrævamarknaðurin er eitt upplagt amboð at brúka í privatiseringini av Fiskavirking og Fiskasøluni.

Framtaksgrunnurin er hinvegin á veg til at gera íløgu í Smyril Line, sum hevur brúk fyri nógvum nýggjum milliónum í partapeningi fyri at tryggja sær, at nýggja skipið hjá felagnum verður bygt og latið felagnum.

# Pan Fish sigur seg hava keypt

**Norska stórfyritøkan Fan Fish sigur seg longu hava keypt partabrøvini, sum P/F Varðin hevur seld Føroya Sildasølu**

SØLA
*Eyðun Klakstein*

Norska fyritøkan Pan Fish hóttir við sakarmálið, nú tað er komið fram, at P/F Varðin hevur selt síni partabrøv í Føroya Fiskaídnaði til L/F Føroya Sildasølu.

Útvarp Føroya segði á middegi í gjár, at norska fyritøkan heldur seg hevur gjørt skrivliga og bindandi avtalu við Varðan um júst tey somu partabrøvini.

Umboðsmaður fyri Pan Fish segði við Útvarpið, at teir høvdu gjørt avtalu við P/F Varðan mikudagin í farnu viku, og at Varðin tí ikki kundi selja partabrøvini til nakran annan.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa viðmerkingar frá føroysku feløgunum til málið.

# Tvær triur leika

**Mikukvøldið 17 jan. verður konsert í Listaskálanum við Tórshavnar Floytutrio og Tórshavnar Kamartrio**

TÍÐINDASKRIV

Konsertin byrjar við at tónlistarfólkini spæla í hvør sínum torni, áðrenn farið verður undir høvuðsskránna.

Floytutrioin er manna við Andreu Heindriksdóttir, Magnu Jógvansdóttir og Gunnvør Eyvindsdóttir Mohr.

Skráin hjá teimum fevnir víða, heilt frá barokktónleiki til nútíðartónleik, við verkum eftir Boismortier, Mozart og Weiss. Verkið »Fünf skitzen« eftir Weiss er skrivað í 1970, og er eitt litrík verk við modernaðum rytmum og klangum.

Í Tórshavnar Kamartrio eru Berghild Poulsen, sopran, Árni Hansen, klaver og Bjarna Berg, klarinet. Tey framføra verk eftir Schubert, Mozart og Cherubini. Eitt av verkunum er ”Hirt auf dem felsen” sum er sera krevjandi fyri sopranin og er eitt av høvuðsverkunum fyri sang og klaver við klarinett obligato.



Oljuhavn í Suðuroy:

# Settu fót fyri sær sjálvum

**–Eg skilji væl, at oljuhavnin ikki varð løgd á Drelnesi. Eg rokni eisini við, at Landsstýrið hevur roynt at ávirka oljufeløgini til ikki at leggja oljuhavnina á Drelnesi, tí tað hevði komið landsstýrinum í álvarsligar trupulleikar sigur Jákup Joensen í Lopra**

ÚTGERÐARHAVN
*Áki Bertholdsen*



*– Eg ivist ikki í, at Landsstýrið - undirhondshevur havt ein fingur við í spælinum, tá ið avgerðin varð tikin um, at oljuhavnin skal ikki vera í Suðuroynni, sigur Jákup Joensen í Lopra*

– Hevði Oljuhavnin verðið løgd á Drelnesi, hevði tað sett Landsstýrið í eina ómøguliga støðu.

Jákup Joensen í Lopra skilir væl, at oljufeløgini hava gjørt av, at oljuhavnin ikki skal verða á Drelnesi.

Hann sigur, at Drelnes er jú samferðsluhavnin í Suðuroynni, og tað var hana, sum ætlanin var var gera til oljuhavn.

– Bleiv oljuhavnin løgd á Drelnesi, hevði Landsstýrið tískil verðið noytt til at útvega eina nýggja samferðsluhavn í Suðuroynni. Tað hevði ført til stórar útreiðslur fyri landskassanútreiðslur, sum Landsstýrið hevði verðið noytt til at útvega uppá lutfalsliga stutta tíð. Tvøroyrar Kommuna hevur ikki ráð til at byggja eina nýggja samferðsluhavn og tí er hetta ein útreiðsla, sum landskassin heilt einfalt ikki hevði sloppið undan.

– Samstundis vita vit, at bæði vestminningar og lorvíkingar hava sett Landsstýrinum krøv um at gjalda meiri av teirra samferðsluhavnum.

– Havði Landsstýrið so bygt eina nýggja samferðsluhavn í Suðuroy, hevði tað heldur ikki sloppið undan at játta meiri peng til havnirnar í Lorvík og í Vestmanna.

– So alt í alt hevði tað komið Landsstýrinum í álvarsamar trupulleikar, sum høvdu kostað landskassanum so nógv, at tað er ilt at meta um tað nú.

Umframt sjálva útreiðsluna, hevði hetta eisini kollrent tær ætlanir, sum landsstýrið hevur um útbyggingar í hesum landi tey næstu árini. Avgerð er tikin um at Landskassin skal ikki brúka meiri enn 150-200 milliónir um árið til verkløg. Ein nýggj samferðsluhavn á Drelnesi hevði tískil tømt tað játtanina, so at tað ikki hevði verið pláss fyri øðrum útbyggingum.

Jákup í Lopra ivast ikki í, at Landsstýrið hevur tikið alt hetta í sínum metingum av, hvar oljuhavnin liggur best fyri. Og hann heldur, at tað er logiskt, at Landsstýrið ikki vil hava útgerðarstøðina á Drelnesi, tá ið tað eru onnur støð í landinum, har havnin kann verða, uttan at tað kostar landskassanum eina krónur.

– Eg ivist heldur ikki í, at undirhonds hevur Landsstýrið havt ein fingur við í spælinum og sagt sína áskoðan fyri oljufeløgunum, hvar oljuhavnin helst ikki skal vera.

– Alt hetta málið snýr seg sostatt um at forða fyri, at landsstýrið kemur í trupulleikar av siglingini hjá Strandferðsluni.

### Settu fót fyri sær sjálvum

Tí Jákup Joensen, at Nordserv, sum ætlaði at gera eina oljuhavn í Suðuroy, í veruleikanum setti fót fyri sær sjálvum við at vísa á Drelnes.

Jákup Joensen sigur, at einaferð hann var í Danmark, var hann inni hjá Danbor Service í Esbjerg og fann Steen Hansen, sum skuldi vera stjóri fyri oljuhavnini á Drelnesi.

– Eg greiddi honum frá, at eg helt tað vera eina skeivt mett , tá ið Tvøroyrar Kommuna helt, at tað uttan víðari kundi taka Drelnes til Oljuhavn.

– Eg spurdi hann tí, um tað ikki hevði verið skilabetri um ikki Tvøroyri og Vág løgdu saman í eina sterka eind ímóti mistaðarøkinum og gjørdu eina felags ætlan um oljuhavn í Suðuroynni. Alt tað velduga havnaøki í Vági kundi so verðið brúkt til oljuhavn, ímeðan øll umsiting kundi verið á Tvøroyri.

Jákup Joensen sigur, at hann var bilsin, tá ið Steen Hansen segði, at hann ongantíð hevði verið í Vági.

–Eg skilti eisini á honum, at tað var ongin áhugi at fáa Vág upp í.

– Nú hevðu hann so í samrøðu við Sosialin sagt, at hann vil ikki avvísa, at teir høvdu verið betri fyri, um teir eisini høvdu havt Vág at vísa á til oljuhavn. Men nú er “løbet kørt” sum hann eisini sjálvur tekur til.

Hvønn týdning oljuvinnan hevði havt, um hon kom til Suðuroynna, vil hann ikki meta um. Ei heldur, hvørjar avleiðingar, tað fer at fáa, at hon ikki kemur.

Jóannes Eidesgaard:

# Hugtyngjandi at vera javnaðarmaður í hesum døgum

**– Vit mugu bara staðfesta, at vit hava tapt stríðið ímóti samgonguni um oljuhavnina. Samgongan hevur svorið peningavaldinum trygdareið og vit fáa ikki gjørt meir, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins**

OLJUHAVN
*Áki Bertholdsen*



*– Peningavaldið vann stríðið um oljuhavnina.Vit hava gjørt tað, vit kundu, men taptu. Tey í samgonguni, sum siga seg hava ringa samvitsku, kunnu vit ikki taka fyri fult, sigur Jóannes Eidesgaard, sum her stendur við modellinum av oljuhavnini á Drelnesi. Myndin er frá teimum døgum, tá ið tey á Tvøroyri enn hildu seg hava góð kort í hondini*

– Tað er ógvuliga hugtyngjandi at vera javnaðarmaður í hesum døgum. Tí nú mugu vit staðfesta, at samgongan hevur slept teimum samfelagsligu áhugamálunum og hevur ístaðin svorið tí stóra peningavaldinum trygdareið.

Jóannes Eidesgaard ásannar nú, at javnaðarflokkurin hevur tapt stríðið um, hvar í Føroyum, oljuhavnin skal vera.

Javnaðarflokkurin legði fyrr í ár uppskot fyri tingið um, at Landsstýrið skuldi áleggja oljufeløgunum at hava oljuhavnina í Suðuroy.

Men hetta uppskotið fall og sum kunnugt er tað nú greitt, at oljuhavnin verður ikki í Suðuroynni, tí felagið, sum ætlaði at gera oljuhavn á Drelnesi, sleppur ikki so frægt sum at bjóða uppá oljuhavnina.

Eftir at tað er blivið greitt, at oljuhavnin verður antin í Havn, ella í Runavík, hevur tað ljóðað, at javnaðarflokkurin fer enn einaferð at leggja uppskot fyri tingið um, at oljuhavnin skal vera í Suðuroynni.

Men tað avsannar formaður javnaðarfloksins.

– Vit hava gjørt tað, sum stendur í okkara makt. Vit hava troytt teir politisku møguleikar vit hava til fulnar og vit mugu nú staðfesta, at vit sleppa ikki longur. Tí fara vit ikki at leggja uppskotið um oljuhavn í Suðuroy framaftur, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Ein politiskur trupulleiki

Formaður javnaðarfloksins sigur, at spurningurin um, hvar oljuhavnin skal vera, er ikki bara ein spurningur um, antin tað er rætt av politiska myndugleikanum at leggja seg út í, hvussu vinnulívið skipar seg.

– Hetta er sanniliga eisini ein samfelagsligur trupulleiki. Tað slepst ikki undan, at vit hava ein bygnaðarligan trupulleika í Føroyum, og tað er, at Suðuroyggin verður meiri og meiri afturútsigld.

– Og tað er heilt avgjørt ein politiskur spurningur, sum bara kann loysa politiskt. Tað var hendan trupulleikan, sum vit royndu at loysa, tá ið vit løgdu uppskot fyri tingið um at oljuhavnin skuldi vera í Suðuroynni.

– Men vit mugu ásanna, at tað var peningavaldið, sum vann, og ikki tann politiska loysnin.

Jóannes Eidesgaard heldur, at tað er beinleiðis ósømiligt, at Suðuroyggin ikki so frægt, sum sleppur upp í part.

– Hinvegin hava vit tvey føroysk feløg, sum eru við í teimum samtøkum, sum sleppa at bjóða uppá oljuhavnina. Tað er onki at ivast í, at hesi bæði feløgini hava síni áhugamál. Føroya Kolvetni, við partaeigarum úr Runavík, vil hava oljuhavnina í Runavík og Atlantskolvetni, við Poul Mohr og Kjartan Hoydal á odda, vilja hava oljuhavnina í Havn.

– Jóannes Eidesgaard sigur, at hetta vóru tær peningasterku kreftirnar, sum settu tað politiska valdið upp á pláss.

Møguliga fegnast landsstýrið eisini um, at tað nú sleppur undan at gera eina nýggja samfeðrsluhavn í Suðuroynni.

Tað hongur heldur ikki saman, tá ið tjóðveldisflokkurin harmast um, at Suðuroyggin ikki sleppur upp í part, men samstundis áleggur landsstýrismanninum í oljumálum halda landsins lógir.

– Tað er onki høpi í, tí at gera nakað nú, er at leggja Eyðuni Elttør ein myndugleika til, sum hann ikki hevur. Tað varð eisini staðfest á samgonufundi aftaná, at landsstýrið ger ikki meiri við málið.

–Meinar tjóðveldisflokkurin nakað við málið, er hann vælkomin at royna seg í tinginum, men eg vænti mær nú ikki nógv haðani.

Hann heldur lítið um tað, sum nú er frammi um at gera tvær oljuhavnir.

– Hetta er tað vanliga føroyska. Tá ið vit ikki klára at loysa eitt mál á rættan hátt, gera vit fleiri loysnir. Vit vita, at tað verður ongantíð talan meiri enn eina oljuhavn.

– Annars hevur tað verið nevnt, at orsøkin til at Suðuroyggin ikki slapp upp í part, var, at samferðslan var ikki nóg góð og at havnin var ov grunn?

– Eg haldi, at tað er heilt óhugsandi, at eitt vælkent felag sum Danbor leggur eina ætlan á borðið, sum ikki kann brúkast. Tí haldi eg, at tað hevur verið eitt tað fremsta endamálið hjá Atlantskolvetnið og Føroya Kolvetni at ávirka oljufeløgini til at velja antin Runavík ella Tórshavn. Og tá ið tú sært, hvør stendur aftanfyri hesi feløgini, er samanhangurin greiður.

– Virkar havnin ikki, er tað ein teknisk loysn, sum kann loysast. Tað er neyvan heldur nakar so góðtrúgvin, at trupulleikarnir hjá Suðuroynni verða loystir, bara Smyril siglir oftari til Havnar. Tað er tvøturímóti beint øvugt. Økist virksemið í Suðuroynni, verða fleiri túrar av sær sjálvum. So tær undanførslurnar kunnu ikki brúkast til nakað, sigur Jóannes Eidesgaard.